## Íslendingar fiskaðu minni

Íslendsk skip fiskaðu ikki so nógv í januar í ár sum í sama mánaði í fjør. Tøl hjá hagstovuni í Reykjavík vísa, at tilsamans landaðu skipini 55.445 tons í síðsta mánaði aftur ímóti 71.500 tonsum í januar í 2009. Tað mesta, sum kom upp á land í síðsta mánaði, var botnfiskur, 31.300 tons, sum var heldur minni enn í januar í fjør. Sambært hagstovuni er tað kortini áhugavert, at skip og bátar landaðu 1.700 tons meiri av toski í síðsta mánað enn í januar í 2009. Haraftur-ímóti sveik uppisjóvarfiskurin og serliga sildin, sum bara var ein triðingur av veiðini í januar í 2009.



## Svenska kirkjan sparir

Leiðslan í svensku kirkjuni hevur gjørt av at spara, og tað hevur millum annað við sær, at tann svenska kirkjan í Skagen í Danmark letur aftur. Bygningarnir, sum kirkjan heldur til í, verða lýstir til sølu, og starvið hjá prestinum verður niðurlagt í desember. Haraftur-ímóti heldur tann svenska kirkjan í Keypmannahavn fram, men hon skal nú klára seg við egnari hjálp, tí hon missir ta almennu játtina. Tann svenska kirkjan í Skagen rekur eisini eina matstovu og eitt vallaraheim, og í fjør hevði hon 55.000 gestir á vitjan.

# Nýtt shippingfelag stovnað

**Reiðaríið Thor, www.crew.fo og Óla Hans Hammer Olsen hava stovnað felag, sum roynir at fáa fleiri skip undir FAS, átekur sær at útvega manning til skip, umsita tað tekniska og at útvega skipum og reiðaríum góðkenningar**




SKIPAVINNA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinastu tvey árini eru fleiri skip komin unir FAS-skipanina, og tað ber til at fáa fleiri skip enn undir skipanina.

Hetta halda menninir, sum hava stovnað felagið TYR Shipping Management.

Fleiri av skipunum í FAS hava brúkt m.a donsk management feløg at hjálpa sær við ymiskum spurningum og at usmita skipini, men menninir í nýggja shippingfelagnum halda, at teir tað sama kunnu røkja hesa uppgávu og verða við til at útvega nógvan pening til landið.

Menninir aftan fyri TYR Shipping Management eru reiðariið Thor í Hósvík, crew.fo og Óla Hans Hammer Olsen, fyrrverandi stjóri á Skipaeftirlitinum.

### Kann blíva stór vinna

- Aðrastaðni liva fleiri fólk væl av at vera í shippingvinnuni, og vit ætla nú at stápla eina slíka vinnu upp á beinini í Føroyum, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Fyrst og fremst verður roynt at fáa fleiri skip upp í FAS, og felagið átekur sær at finna at hava tekniskt eftirlit við skipunum, at fyrisita ISM og ISPS skipaninar, sum eru lógarkravdar til hesi skip. Felagið átekur sær eisini konsulenttænastur til skip, sum higartil í stóran mun hava verið keyptar uttanlands. Haraftrat átekur felagið sær at manna og umsita manningar á skipunum. Í framtíðini er ætlanin at felagið skal átaka sær fleiri av meira handilsligu uppgávunum, eitt nú at tryggja skipunum farm og charteravtalur.

Ætlanin er, at felagið fær myndugleikagóðkenning í mars mánaði í ár. Mannagongdirnar sum skulu gerast í sambandi við slíka góðkenning eru allar gjørdar.

### Fleiri tænastur

Nýggja felagið hevur bygt upp eitt netverk av fyritøkum og fólki, og tað netverkið er komið á pláss.

Ætlanin hjá felagnum er at fara í holt við at veita nakrar av meira vitanartungu tænastunum til skip, sum ikki áður, ella bert í sera avmarkaðan mun áður hava verið veittar í Føroyum.

- Vit hava fingið samband við tær frægastu tænastufyritøkurnar her og aðrastaðni og kunnu selja tænastur og keypa tænastur eftir tørvi, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Síðan 2008 eru fleiri skip komin í FAS, orskað av at lóggávan tá varð gjørd meira lokkandi. Slíkar broytingar mugu gerast alla tíðina, so FAS ikki dettur niður fyri aftur, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Síðani Óli Hans Hammer Olsen og crew.fo byrjaðu at tosa óformliga um mánaðarskiftið apríl – mai 2009, hevur hetta samstarvið hjálpt við skráseting av fimm skipum í FAS. Umframt hava Jónas Sigmarsson og Óli Hans Hammer Olsen verið í Svøríki og vitjað svensku tangaskipa reiðaríini, sum seinni í 2009 og aftur í 2010 hava skrásett fleiri av skipum sínum í FAS.

Tað gevur landinum nógvan pening, at skip koma upp í FAS.

- Tað seinasta skipið, sum kom uppí, gevur 300.000 krónur um mánaðin, og vit arbeiða nú við at fáa fleiri skip aftrat uppí. Vit vænta, at tá ið hesi skip eru komin í vinnu, koma fleiri aftrat upp í skipanina. Málið er at fáa 300 skip undir føroyskt flagg, og tað skuldi givið nógvar vinnumøguleikar aftrat, sigur Óla Hans Hammer Olsen.




*Fleiri og fleiri útlendsk skip koma undir føroysk flagg, og tað gevur nógvan pening til Føroya*